## DAGSINS MEINING

# Gluggaglæma

Tað var ein sera spennandi og hugvekjandi framsýning, sum varð hildin i Mullers. Henda framsýning er eitt sera gott dømi um tað hugflog og teir møguleikar, ið finnast í føroyskum heimavirki og í føroyskum listahandverki. Her er ikki talan bert um eina valiga framsýing, men um eina lutvíst arbeiðandi framsýning. Her bar til at síggja, hvussu listaverkini og lutirnir verða til. Hetta er eitt frálíkt hugskot og vinnur framsýningin nógv við júst hesum formi.

Framsýningin nevndist Gluggaglæma og her var alt, sum hugsast kann av handverki og listahandverki: ull og tøting, skinn og roð, vevnaður, binding og sniðgeving. Her kundi tann vitjandi eisini fáa kunnkeika til gamalt føroyskt handverk sum knívasmíð og bátasmíð. Eisini nýggjari listahandverksgreinir so sum grótlist vóru við. Eisini sýningar við føroyskari mótalist og tónleikaundirhald av ymsum slagi.

Tað er einki at ivast í, at stórir møguleikar eru í hesum øki. Hetta er eitt øki, sum tekur støði í gamlari føroyskari handligari menntan eins væl og nýggjum íblástri uttaneftir. Her er samstundis talan um eitt øki, ið ikki tykist vera eins høgt raðfest og vanlig list eitt nú tónleikur og myndlist. Økið er undir Vinnumálaráðnum og vit vilja fegin mæla Vinnumálaráðnum til at stuðla hesum øki av øllum alvi. Skulu vit í Føroyum tala um mentanarturismu, so eru listahandverk og føroyskt heimavirki fortreytir fyri, at henda vinna kann mennast í framtíðini. Fyrireikararnir kunnu vera nøgdir við ta stóru undirtøkuna. Og vóna vit, at stigtakarar og luttakarar halda fram á somu stevnu. Vit gleða okkum til næstu ferð høvið verður at vitja líknandi tiltak í Müllers pakkhúsi ella aðrastaðni í landinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Danmark — Heimurin 90-15

**Lív Patursson**
*lesandi í Reykjavík,*
*lpatursson@hotmail.com*

"Liðug í Hoydølum? Nær fert tú niður?" Hetta er allarhelst spurningur, ið allar nýklaktar pisur hava hoyrt nógvar ferðir. "Nær fert tú niður?" Tað er sjálvsagt, at ein fer niður, ella hvussu? Jú, sjálvsagt fara vit føroyingar til Danmarkar at lesa. Tað er jú so nógv lættari! Og helst skal ein ikki stríðast ov nógv. Nei, vit fara niður á Oyrasundskollegiið saman við øllum vinunum og á Jacques um kvøldið (har kunnu vit eisini keypa Føroya Bjór og Club20-skot).

Men hví er tað so? Hvat er tað, sum ger, at vit føroyingar bara, uttan at hugsa stórvegis um tað, fara beina leið til Danmarkar at lesa?

Vantandi kunning er eitt. Kann nevna til stuttleikar, at tá leið móti endanum hjá studentunum í Hoydølum 2003, var ein kunningarfundur á skúlanum um víðari lesnað. Tveir skúlatímar vórðu settir av. Hálvur annar tími varð nýttur til at kunna um lesnað í Danmark, fimtan minuttir vórðu nýttir til restina av heiminum. 15 minuttir til allan heimin og 90 minuttir til pinkulítla Danmark. Danmark er ein minimalur partur av heiminum - ein smátjóð. Men tó varð størsti parturin av kunningarfundinum í Hoydølum nýttur til at kunna um lesnað í Danmark.

Rættiliga skemtiligt, skal eg sjálv siga tað! Samstundis er tað ótrúliga syrgiligt og vánaligt. Vánaligt, at føroyski ungdómurin ikki verður betur kunnaður um lesnað í útheiminum.

Pisudagur í Keypmannahavn, stóð í bløðunum herfyri. Ja yvirskriftin sigur alt. MFS vónar í hesu lýsing at síggja nógv nýggj andlit á Vesterbrogade 17A. Tað eru slíkar lýsingar, ið eru at hoyra í heilum. Havi ikki hoyrt um nakran pisudag í Reykjavík. Haldi heldur ikki at nakar hevur verið í Oslo, ella nakra aðrastaðni …

At duga at hugsa sjálvstøðugt er ein ótrúliga góður eginleiki at hava. Men tað ger føroyski ungdómurin ikki, tá talan er um lesna. Men, góði ungdómur, hugsa um tað! Heimurin liggur opin fyri fótum okkara, møguleikarnir eru óteljandi.

Meira og meira vanligt gerst tað í londunum uttan um okkum, at ungdómurin fer til tey mest framkomnu londini at lesa. Har fáa tey ríka og mennandi útbúgving, umframt nýggjan íblástur. Men vit føroyingar fara í sama lag til Keypmannahavnar. Same old same old...gloymið tað — roynið okkurt nýtt for tramin!!

Upplagt og sjálvsagt átti tað at verið, at vit senda okkara fólk til bestu støðini í heiminum at lesa. Soleiðis kunnu vit byggja upp eitt sterkt samfelag við fólki, ið eru útbúgvin á bestu støðunum. Eitt sterkt, dugnaligt og sjálvstøðugt fólk.

Hvussu nógvir lærarar í týskum í Føroyum hava t.d verið í Týsklandi og lisið týskt? Nei, vit fara til Danmarkar, tí har er best at læra týskt... láturligt!

Sjálvandi er ikki skeivt at fara til Danmarkar at lesa, vil ein veruliga tað. Men hví Keypmannahavn og Århus? Hví ikki London, New York ella Tokyo? Allir sera áhugaverdir og framkomnir býir. Svarið er: "nei, tað er alt ov strævið og trupult" ella "nei, tað ber ikki til" Sjálvsagt ber tað til, og, ja, tað er kanska eitt sindur truplari, men hvat so? Tað krevur ikki meira enn nakrar tímar á alnótini og hjá lestrarvegleiðingini. Tað er ikki so ringt!

So er tað tey, ið halda, at tað fíggjarliga er ein fyrimunur at fara til Danmarkar at lesa. Hetta er ikki beint. Til dømis er norðurlendsk samstarvsavtala gjørd, ið millum annað tryggjar føroyingum peningaligan stuðul til lesnað í Norðurlondum. Umframt eru avtalur gjørdar við stór universitetslond so sum Bretland og U.S.A. Fíggjarligu fortreytirnar eru har, teimum manglar bara brúkaran - teg!

Kunning. Fólkinum manglar kunning. Kæru myndugleikar, duga tit ikki at síggja tað? Ella er tað bara líkamikið? Tað hevði verið positivt fyri smátjóðina Føroyar at víðka sjónarringin. Tað hevði verið ein fyrimunur hjá tjóðini. Okkum tørvar endurnýggjan og fjølbroytni. Okkum tørvar fólk við dirvi og nýggjari vitan. Ein kollvelting í hugsunarhátti føroyskra ungdóma skal til. Vit eiga framtíðina — hon liggur í okkara hondum.

Vælgagnist lesari. Vónandi er hetta nakað, ið ungdómurin, sum ætlar sær at lesa, fer at hugsa um!

# Hava tey onga sál?

**Vida Højgaard**

So vóru teir aftur har. Fjølmiðlagribbarnir.

Hesaferð eftir Jóannes Eidesgaard, sum í almennum høpi hevur dittað sær at avdúka, at eisini hann er eitt vanligt menniskja, ið kann gera mistøk.

Avdottin í almennari veitslu. Sera pínligt, og tað reina guff fyri fjølmiðlarnar. Gud vitið, hvat revsingin hevði verið, um teir sluppu at ráða.

Eftirsum eg fyri tíðina einki sjónvarp havi, var tað útvarpið, ið vakti mín harma hendan dagin, tá útvarpskvinnan einar fimm? ferðir - við smærri umformuleringum, sum tey eru ekspertar í - mestsum kravdi, at maðurin mátti fáa eina ábreiðslu frá sínum ráðandi baklandi. Ein eyðmýking framman fyri øllum Føroya fólki og ein treytaleys umbering er alt ov lætt sloppið.

Men ikki nokk við tí. Í sendingini við dagslok fáa vit at vita, at útvarpið hevur roynt at fingið fatur á Jóannes Eidesgaard fyri at fáa eina viðmerking frá honum. Nei álvara.

Hvat við at fara eftir manninum, lata hann spillnaknan, dragsa hann oman gjøgnum Havnargøtur og heingja hann upp í flaggstongina á Tinghúsvøllinum til alment spott og spe?

Vit drýpa høvur. Og taka hattin av fyri Javnaðarfloksins ábyrgdarum, at tey ikki avlívaðu mannin.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Tingkvinna ímóti útjaðaranum

**Finnleif Guttesen**
*útjaðarin*



Fíggjarpolitiski talsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, sum er vald í høvuðsstaðnum, er ímóti øllum stuðli til útjaðarin, Sosialurin 5. september 2003.

**Greið tala frá tjóðveldistingkvinnu**
Hetta er greið tala, sum vit í útjaðaranum kunnu taka til eftirtektar, tí so vita vit hvat nøkur Tjóðveldisfólk ynskja.

Fleiri røddir hava verði frammi um, at alt virksemi skal samlast í miðstaðarøkinum, tí virksemi í útjaðaranum er ov dýrt, virðisøkingin er ov lítil, ikki rentabul, ikki burðardygg o.s.v og ein orsøk til hetta er kostnaðurin av flutningi, av rávøru og lidnari vøru.

**Flutningsstuðulin**
At flutningsstuðulin er avlagandi fyri útjaðarin trúgvi eg ikki uppá, og at flutningsstuðulin ger, at virkir virka vørur sum ikki loysa seg trúgvi eg heldur ikki uppá, tí hvat virkið framleiðir við undirskotið við vilja? - hatta er ørvitistos,- ella heldur hendan tingkvinnan, at vit bert skulu arbeiða tosk?

Hevur hon kannað hví so nógv vøra frá útjaðaranum fer yvir keikant í Tórshavn og hvør fær vinningin av hesum?

**Aðrar vinnur og útjaðarin**
Føroyska høvuðsvinnan er í útjaðaranum og við at gera tað so ólagaligt sum gjørligt fyri vinnuna í útjaðaranum, vil hendan tingkvinnan draga so nógv sum gjørligt til miðstaðarøki.

At aðrar vinnur ikki eru farnar til miðstaðarøki kenni eg ikki so nógv til, tí í útjaðaranum er tað næstan bert fiskivinnan sum heldur hjólini koyrandi og við hugburðinum hjá tingkvinnuni, er vandi á fer í útjaðaranum.

**Broyt hugburð**
Vælsigna verði teg, virka fyri at fiskivinnan mennist, serstakliga í útjaðaranum, lat verða við at leggja fótonglar fyri útjaðarin, játta nógv meira pening til gransking á økinum, so at virðisøking verður veruleiki og ikki sum nú, eitt orð sum tit "landspolitikarar" sleingja út og sum einki hald er í.

# Fólkaatkvøðan ið hvarv

### Hósvíkar bygdaráð við Jógvan Mørkøre á odda ikki búgvið til samanlegging

**Mikjal Hansen**

Hetta er ein forferdilig skomm, ikki bara fyri bygdarráðið, men fyri allar hósvíkingar, tað sum gongur fyri seg.

Tá fólkaatkvøðan tann 6. mai skuldi verða, vóru nakrir kunnandi fundir um hetta. Ein teirra var í Bygdarhúsinum í Hósvík. Á hesum fundinum sat eitt panel. Í panelinumm vóru allir 5 bygdarráðslimirnir og skrivarin hjá felagskommunalu nevndini sat við eina teldu, sum skuldi vísa okkum planin. Tað fyrsta, sum hendi var, at bygdarráðsformaðurin (Jógvan Mørkøre), sum ikki sjálvur hevði sitið í tí sokallaðu samanleggingarnevndini, reisti seg og segði, at hann hevði avgjørt, at hann skuldi sjálvur vera orðstýrari á fundinum og hann skuldi eisini vera talsmaður fyri kommununa, og ikki tey, sum høvdu sitið í hesi nevndini (Jákup og Jonhild). Hetta var ein vánaligur, óhøviskur fundur, har fundarluttakarar fingu ljót aftursvar frá Jógvani Mørkøre upp á spurningar, sum settir vórðu. Hetta sjálvandi tí borgarstjórin ikki visti hvat hann skuldi svara (hann var jú ikki inni í málinum), og tey, sum høvdu verið í nevndini, antin ikki sluppu at svara, ella vistu tey líka lítið. Eyðsýnt var, at hetta snúði seg ikki so nógv um kunning, men meira um at ræða fólkið til at atkvøða ja, tí landsstýrið fór at leggja øki út á kommunurnar og eingir pengar skuldu fylgja við.

Skrivarin hjá Felags kommunalu nevndini sat har og koyrdi hetta dias show ígjøgnum, eitt sindur illa við av úttalilsunum hjá Jógvani og hetta forstýraði hann eitt sindur, so hetta gekk heilt skjótt fyri seg, nógv skiltu einki. Onkur bað um at fáa kunningartilfarið sent ú tí húsini, so varð gjørt. Úr kunningartilfarinum fekk mann fatan av at her snúði tað seg um eina bindandi fólkaatkvøðu.

Seinni varð fundur hildin á Oyrabakka. Her sótu umboð fyri samanleggingarnevndina í panelinum. Hetta var sera góður fundur, har tey, sum sótu í panelinum, vistu hvat tey høvdu við at gera og svaraðu upp á spurningar, sum man eigur.

Eitt, sum kom týðiliga fram á hesum fundinum var, at ongin skuldi lova nakað og ongin skuldi út at gera villar investeringar, samanleggingin skuldi ikki fremjast við gyltum lyftum ella ræðusøgum.

Úrslitið kenna vit. Í Hósvík vóru 81 nei atkvøður, 71 ja atkvøður og ein blonk. Valluttøkan knøpp 82%. Eitt greitt úrslit fyri at varðveita Hósvík sum eina kommunu.

**Men** hetta hóvaði ikki jasigarum. Í fjølmiðlunum vórðu nei-sigarar úthongdir sum fávitskutar afturhaldskreftir, stýrdar av gomlum aggi. Ein mynd varð málað av at hetta skuldi verða ein vanlukka fyri bygdina, at *einans* 10 atkvøður hildu Hósvík uttan fyri kommunusamanleggingina.

Ongum tóktist koma til hugs, at tey 81, sum atkvølddu nei, vóru púra vanlig fólk. Ikki býttari enn onnur vanlig fólk, sum høvdu ta áskoðan, at í Hósvík kundu hósvíksingar sjálvir ráða og gjalda og samstarva við grannarnar. Og tey høvdu eitt sjálvsagt krav uppá virðing fyri úrslitinum av fólkaatkvøðuni.

Longu annan dagin eftir varð farið runt í bygdini at savna undirskriftir (bygdarráðslimir bóðu næstan beinleiðis um tað) til eitt skriv, har heitt varð á bygdarráðið um at leggja saman, altso beint ímóti úrslitinum á fólkaatkvøðuni 6. mai. Ræðusøgur, villir póstandir, lygnir og tóm lyfti vórðu nýtt til at fáa fólk at skriva undir. Fólk fingu at vita, at skrivaðu tey ikki undir, høvdu tey skyldina av, at skúlabørn úr Hósvík ikki longur sluppu at ganga í felagsskúlanum á Oyrabakka, at tey gomlu ikki sluppu á ellisheimið, sum skal byggjast í Streymnesi, uttan fyri okurspris, at tey kundu rokna við stórari eykarokning, tá tey fóru til kommunulæknan, at eingin barnagarður varð bygdur í Hósvík, onkur fekk lovað at undirskriftin var í trúnaði og eingin uttan bygdarráðslimirnir fingu tær at síggja.

Soleiðis gingu tey runt í bygdini og sáðaðu máttloysi niður í fólk, í fleiri umførum, í næstan fýra vikur, til tey at enda komu upp á 98 undirskriftir, harímillum 4 bygdarráðslimir.

Fyri at rættvísgera hesa ómoralsku gerð, varð ført fram, at tað vóru so nógvir nei-sigarar, sum høvdu *angrað* og teir skuldu fáa ein nýggjan møguleika.

Hetta varð so lagt fyri bygdarráðið, sum gleivbeint vrakaði fyrru fólkaatkvøðuna og útskrivaði umafturfólkaatkvøðu, sum skuldi verða 13. sept., góðar 4 mánaðir eftir fyrru fólkaatkvøðuna. Henda framferð var óhoyrd, og *eingin* uttan ja-sigararnir í Hósvík hildu tað vera í lagi.

Úrslitið 13. sept. gjørdist nógv teprari enn 6. mai, nevniliga 83 nei-atkvøður og 88 ja-atkvøður, altso 10 færri enn undirskriftirnar. Og tølini prógva, at undanførslurnar fyri innsavnanini av undirskriftum bygdu á ósannindi.

Men nú fekk pípan hjá borgmeistaranum Jógvan Mørkøre annað ljóð. Nú skuldi málið avgreiðast, eingin angri-rættur og neisigararnir skuldu bara góðtaka úrslitið 13. sept., og sum skilst fer bygdarráðið at samtykkja samanleggingina á fundi í kvøld, 24. sept.

Tað er einki at siga til, at nei-sigararnir í Hósvík føla seg at vera útsettan fyri politiska blygdanarskemt (incest) frá ja-sigarunum.

Mín vón skal verða, at landsstýrismaðurin, sum skal góðkenna samanleggingina, letur rættvísi sigra og staðfestir úrslitið frá fólkaatkvøðuni 6. mai, eisini fyri at søgan ikki skal endurtakast í øðrum bygdum, nú fólkaatkvøður eru so aktuellar.

# Hatur, óndskapur og øvundsjúka

**Hans Birgir Hansen**



Eg havi ongantíð sýnt hatur, óndskap ella øvundsjúku mótvegis øðrum, sum ein sjálvur upplivir, øvugta vegin, tá ein er øðrvísi og í eini serstøðu í mun til medmenniskju kring um seg.

Eg síggi fyri mær nógvu hóttaføllini, har børn, ung og tilkomin gerast býtt, ljót og svøk, ið førir við sær anarki, tá øll setast hvør upp ímóti øðrum, ið førir til undirgang v.m.

Egoisman og materialisman og aðrar -ismur við øðrum heimi, ið stýrdar verða av stórkapitalistiskum kreftum, ið stýra teim borgarligu og sosialistisku afturhalds- og fríu marknaðarkreftunum.

Tað er veruliga heildarskipanin og støðan, og hvørs embætisfólk, fulltrúar, serfrøðingar o.o. ráðgeva løgmanni og landsstýrismonnum, ið eisini verða stýrdir av stórkapitalistiskum kreftum.

Tað sama er galdandi landspolitikarar, ið sita uppi í løgtinginum og sita í teim politisku ráðum og nevndum bæði í andstøðu og í samgongu, sum ein fær gjørt øllum nógv greitt.

Vit hava einki veruligt demokrati/desentralisering/fólkaræði/stýri/bygdar-/býar-/økis-/útjaðaramenning innan fyri áðurnevndu kreftir og politisku skipan úti í politiska lívinum.

Vit hava diktatur, fasismu, hernaðar- og politistatir í einums tørri stati við einaræðisvaldsharrum og serkønum, ið skaptu einstáttað fyriskipað lív føroyinga, sett í bás eftir stættamuni.

Tað, at øll eru fjøtrað, heiladálkað, og -vaskað, indoktrinerað í sinnalagnum og umskapað til robottar og skitnu arbeiðsamboðini ímóti teim, ið bert eru øðrvísi, ið ein viðger í bløðum.

Tað er óhugnaligt at síggja og upopliva øll, ið hjúkla um og sleikja fyri áðurnevndu, ið ein finst harðliga at við konfrontatiónum, tá ið øll fremja og uppihalda alla samfelagsórættvísina.

Tað er óhugnaligt at síggja og uppliva robottføroyingar vera so fyrilita-, kenslu-, samvitsku-, skyld- og ábyrgdarleys, køld og kynisk mótvegis medmenniskjum úti í øllum kommunum í dag.

Eg eri fyri fullum frælsum, manna- og javnbjóðis rættindum og privatlívsfriði, tryggjað ímóti óviðkomandi uppílegging uttanífrá, og at øll kunnu liva og virka sjálvstøðugt í dag.

Vit eru øll líka verdig í samfelagsligum høpi, og eingin er meira verdur enn onnur í samfelagsligum høpi, sum ein ger øllum nógv greitt úti í øllum kommunum í bløðum.


**Sosialurin** hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo